ítróttur

Nr. 138 • týsdagur • 23. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Størsta uppgávan heima á landi

Birgir Sondum sigur steypafinaluna vera størstu uppgávuna í Føroyum, og hann gleðir seg til Ólavsøku

Mynd: Savnsmynd

Birgir Sondum hevur bíðað í fleiri ár eftir finaluni um løgmanssteypið, ið hann heldur vera størsta avbjóðingin, sum ein føroyskur dómari kann fáa í Føroyum

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Birgir Sondum verður dómari í finaluni um løgmanssteypið, sum ólavsøkudag verður ímillum HB og NSÍ.

Tá vit tosa við hann, dylur dómarin ikki, at hann er ógvuliga fegin og kennir uppgávuna sum stóran heiður:

– Eg havi altíð hildið, at kjansurin at døma finaluna um løgmanssteypið er tað størsta, sum ein dómari kann røkka í Føroyum. Tí kann tað ikki undra, tá eg sigi, at vit, sum hava fingið uppgávuna, eru sera spentir. Vit tosa nógv um dystin, og vit kenna, at vit eru væl fyri. Sjálvandi vóna vit, at tað fer at ganga væl. Tað skal helst vera soleiðis, at spælararnir og áskoðararnir ikki leggja so nógv til merkis, hvør tað er, sum bríkslar. Men vit kenna treytirnar. Mistøkini hjá dómaranum nýtast ikki at vera nógv, men tey kunnu hava alstóran týdning fyri, hvussu dystargongdin verður, og hvussu úrslitið av dystinum verður, sigur Birgir Sondum.

Á linjuni í steypafinaluni vera Regin Egholm og Georg N. Rasmussen. Jógvan Næs verður 4. dómari. Finalan um løgmanssteypið verður klokkan 16.00 ólavsøkudag. Klokkan 13.30 fara HB og KÍ at spæla finaluna í steypakappingini hjá kvinnum. Tá verður Jens Petur Brattalið dómari. Á linjunum vera Eyðun Kjærbo og Poul E. Jacobsen. Johann Krog verður 4. dómari.

Bíðaði leingi

Birgir Sondum veit at siga okkum, at hann dømdi fyrstu ferð í 1. deild í 1987. Tá var hann fyri tað mesta linjuverji, men hann dømdi onkra ferðina, og so hevur tað bara vundið uppá seg.

Tí kann ikki sigast annað, enn at Birgir Sondum leingi hevur bíðað eftir størstu uppgávuni í Føroyum.

Hevur tú verið vónbrotin, at tú ikki fyrr hevur fingið møguleikan at døma finaluna?

– Tað hevði ikki verið rætt, um eg segði, at eg ongantíð havi verið vónbrotin. Í fyrraárið tóktist tað sum um, at eg hevði góðan møguleika at døma. Men so kom boykottið, sum tíbetur nú er gloymt, uppí, og so fekk Suni Johansen møguleikan at døma og ikki eg. B36 var annað liðið í finaluni í fjør. Eg eri skrásettur sum dómari fyri B36. Tí var tað nátúrligt, at eg ikki fekk møguleikan í fjør. Men nú er hann har, og eg gleði meg.

Ert tú væl fyri at døma finaluna?

– Eg havi verið í Spania í summarfrí. Undan fráferðini fekk eg eitt vink frá Karl Vidtfeldt um, at eg skuldi døma finaluna. Eg hevði venjingarklæði við mær, og eg havi vant nógv, og eg havi livað regluligt og sunt, meðan vit hava verið sunnanfyri, sigur dómarin, sum harvið avdúkar orsøkina, um onkur skuldi ivast í, hví svartklæddi maðurin verður rættuliga brúnbeintur í finaluni!

Liva av at døma

Dómarar siga ofta, at síðani teir fingu dómarabasilluna í blóðið, hevur tað so at siga ikki borið til hjá teimum bara at hugt at og notið fótbóltsdystir. Tað ber teimum ikki til at fylgja við spælinum uttan at taka støðu til, hví dómarin bríkslaði ella ikki bríkslaði, og um hann nú gjørdi rætt ella ikki rætt.

– Eg fylgdi væl við í HM endaspælinum, og eg fylgdi serliga væl við í dømingini. Eg haldi, at flestu dómararnir stóðu seg væl. Men teir gjørdu mistøk, og fáu mistøkini vóru katastrofal. Tey høvdu nógv at siga fyri, hvussu dystir endaði, og harvið hvussu tjóðir stóðu seg. Sjálvandi er tað sera spell, at tílík mistøk koma fyri. Men tað staðfestir, hvussu stór ábyrgd tað er at vera dómari.

Hvørjar dómarar heldur tú vera teir bestu?

– Eingin ivi er um, at europeisku dómararnir eru teir bestu. Teir hava eisini bestu fyritreytirnar at døma, tí teir eru professionellir. Í NM fyri U–16 landslið, sum í fjør var í Vejle, var eg saman við Mattew Messias. Hann er ein av 24 fulltíðar dómarum í bestu eingilsku deildini. Hann segði mær, at teir tjena 500 túsund krónur um árið fyri at døma. Men hetta var lítið afturmóti í Italia, har teir bestu fáa eina millión um árið fyri at vera fulltíðar fótbóltsdómarar. Tað ljóðar av nógvum, men tá havt verður í huga, at teir dømna kanska í tíggju ár á hægsta stoði, og at teir ikki hesa tíðina kunnu taka við avbjóðingum í vinnulívinum, so haldi eg ikki, at tað er so ógvuliga høg løn.

Birgir Sondum heldur, at hesir dómararnir eru nógv teir bestu í heiminum. Tí heldur hann, at tað er eyka harmuligt, at teir í HM endaspælinum ikki fáa fleiri dystir, enn dómarar aðra staðni frá fáa.

– Men tað er politikkur í hasum, sum tað er í so mongum øðrum, so tað gerst neyvan so nógv við tað. Men tað gongur úr yvir fótbóltin og fótbóltsspælararnar, staðfestir Birgir Sondum. Sum øll onnur so vónar hann inniliga, at veðrið verður betri ólavsøkudag, enn tað var í fjør.

Fyri at døma fáa hann og teir tríggir, sum eru saman við honum um uppgávuna, 2500 krónur at býta ímillum sín.

– Eingin dómari brúkar tíðina til hetta ítrivið fyri at vinna pengar. Umstøðurnar hjá dómarunum eru betraðar seinastu árini, men tað kundi kanska verið eitt sindur betri. Útreiðslurnar skulu burtur av teimum 2500 krónunum, og eg haldi, at tað er órímuligt, at teir í Klaksvík og í Suðuroy ikki skulu leskast eitt sindur meiri enn vit í miðstaðarøkinum, sum brúka væl minni tíð til dømingina, enn teir gera, og sum ivaleyst harvið eisini hava færri útreiðslur av dømingini, heldur Birgir Sondum.

Kenneth Ellefsen vann síðstu etapuna

Við sigrinum sunnudagin, undirstrikaði Kenneth støðuna hjá dønum, sum vinnarar av øllum etapunum í kappingini í ár

STATOIL KRING FØROYAR
Páll Holm Johannesen

Fyrstur á mál sunnudagin í Statoil Kring Føroyar kappingini, gjørdist Kenneth Ellefsen. Kenneth lá í oddinum alla kappingina, og í endaspurtinum við Morten Truelsen, gjørdist hann skjótastur.

Danir vunnu allar kappingarnar

Kenneth Ellefsen var fjórði danin, sum vann eina kapping í Statoil Kring Føroyar. Í ár hava danir vunnið hvørja ferð. Karsten Ellerup vann tvær reisir, meðan Anders Rasmussen, Ken Holmqvist og Kenneth Ellefsen hvør sína ferð.

Óhapp í Saksun

Allir súkklarnir fylgdust frá startinum av Eiði til Saksunar, og komnir niðan úr Saksun, tóku seks mans seg úr samlaða flokkinum. Hesir vóru Kenneth Ellefsen, Morten Truelsen, Stephen Phillip, Páll Didriksen, Christian Brandt og Hendrik Guldlager.

Eftir at teir fyrstu seks stungu av frá tí samlaða flokkinum, hendi tíverri ein stórur samanstoytur í Saksun, har eini tíggju súkklarar endaðu niðri á vegnum, men einasti súkklarin, ið máttu leggja frá sær, var føroyski Eli Christiansen.

Eli noyddist út á Landssjúkrahúsið, og tíbetur varð ongin álvarssamur skaði staðfestur

Teir seks fremstu fylgdust heilt til Kaldbakstunnilin, men tá dragnaði Páll Didriksen, og hinir fimm fóru frá honum.

Við gomlurætt fullu so Christian Brandt og Hendrik Guldlager frá, meðan hinir tríggjir settu kós ímóti Havn.

Stephen Phillip var næstur í røðini at missa, og Kenneth Ellefsen og Morten Truelsen vóru eftir í oddinum. Teir stríddust so um fyrsta plássi, og í einum hørðum endaspurti, varð Kenneth Ellefsen fyrstur á mál.

-Væl eydnað kapping

Kenneth Ellefsen var fegin um, at keðiliga umtalan seinastu árini, ikki var í ár

STATOIL KRING FØROYAR
Páll Holm Johannesen

Vinnarin sunnudagin, Kenneth Ellefsen, var rættiliga væl nøgdur við kappingina í ár.

– Hetta er fjórða árið, eg luttaki, og eg má siga, at í ár hevur kappingin verið tann besta higartil.

Kenneth vísti á, at undanfarin ár hevur tónarlagi millum súkklararnar ikki verið av tí besta, orsakað av ymiskum ósemjum, men í ár hevur verið øðrvísið.

-Á tí persónliga økinum kundi gingið betur, men tað taki eg ikki so tungt, tí eg havi haft nakrar góðar dagar her í Føroyum, og tað er tað týdningarmesta.

Kenneth var eisini fegin um at sleppa at súkkla etapu-súkkling, tí tað er ikki á hvørjum degi hann sleppur tað. Í Danmark eru tað bara teir fremstu súkklararnir, ið royna seg í kappingum, sum fevna um fleiri dagar, og tí var Kenneth fegin um at sleppa royna tað.

– Í Danmark eru vit vanir við, at súkkla somu teinar ár aftaná ár, og í hesari kappingini sleppur man at súkkla, sum hann sjálvur tekur til frá strekki a til b, og tað dámar teimum flestu súkklarunum best, segði Kenneth eftir kappingina.

Kenneth var ikki í iva, tá hann varð spurdur um hann ætlaði sær at luttaka aftur næsta ár, -Sjálvandi veri eg við aftur næsta ár, vóru síðstu orðini frá Kenneth, áðrenn hann skuldi gera seg til reiðar til endaveitsluna sunnukvøldið.

Nr	Navn	Felag	Klaksvík Tíð	Plac	Eysturoy Tíð	Plac	Sandoy Tíð	Plac	Suðuroy Tíð	Plac	Streymoy Tíð	Plac	Saml.tíð	Km/t
1	Karsten Ellerup	VCK	00.10.58	1	02.47.52	2	00.37.04	1	01.52.42	3	02.54.09	5	08.22.45	38,07
2	Anders Rasmussen	LCC	00.11.02	2	02.47.36	1	00.37.20	2	01.53.51	7	02.54.09	6	08.23.58	37,98
3	Leon Vibholm	HAC	00.11.27	5	02.48.36	3	00.38.45	3	01.52.42	2	02.54.09	8	08.25.39	37,85
4	Kenn Holmquist Olsen	TCR	00.11.37	8	02.48.36	4	00.40.04	8	01.52.42	1	02.54.09	7	08.27.08	37,74
5	Gunnar D. Olsen	TSF	00.11.23	3	02.52.10	5	00.39.07	4	01.53.51	4	02.55.33	10	08.32.04	37,38
6	Richard Jones	YMON	00.11.38	9	02.52.10	7	00.39.51	6	01.53.51	6	02.55.46	12	08.33.16	37,29
7	Johan Reis	ACR	00.11.36	6	02.52.10	6	00.40.09	9	01.53.51	5	02.55.41	11	08.33.27	37,28
8	Morten Truelsen	FIX	00.12.06	17	02.52.10	9	00.40.22	11	01.57.00	12	02.52.02	2	08.33.40	37,26
9	Christian Brandt	ACR	00.11.58	13	02.52.10	8	00.41.48	14	01.57.00	11	02.53.52	4	08.36.48	37,04
10	Henrik Knudsen	MTB	00.12.00	14	02.53.36	10	00.41.24	13	01.57.00	10	02.54.33	9	08.38.33	36,91
11	Stephan Phillip	VCK	00.11.37	7	02.58.28	11	00.40.09	10	01.57.03	13	02.52.24	3	08.39.41	36,83
12	Kenneth Ellefsen	TSF	00.11.46	11	03.02.37	13	00.41.19	12	01.53.51	8	02.52.02	1	08.41.35	36,7
13	Sverri M. Edvinsson	TSF	00.11.27	4	03.02.37	12	00.39.36	5	02.00.23	14	03.13.39	15	09.07.42	34,95
14	David Thomas	YMON	00.11.43	10	03.11.10	15	00.40.03	7	02.02.45	15	03.11.47	13	09.17.28	34,33
15	Jens Sigurd Simonsen	TSF	00.13.14	27	03.15.50	16	00.45.42	27	02.05.11	18	03.12.07	14	09.32.04	33,46
16	Arwel Jones	YMON	00.12.03	16	03.16.46	17	00.42.07	15	02.13.09	24	03.19.16	20	09.43.21	32,81
17	Beinir Rasmussen	TSF	00.12.13	20	03.17.07	18	00.42.15	16	02.03.16	17	03.30.03	24	09.44.54	32,72
18	Allan Søndergaard	HCK	00.13.03	25	03.22.07	19	00.44.33	23	02.13.09	23	03.14.31	18	09.47.23	32,59
19	Dave Williams	YMON	00.12.36	22	03.25.22	20	00.45.08	25	02.10.05	19	03.14.26	17	09.47.37	32,57
20	Gareth Blackshaw	YMON	00.11.53	12	03.27.05	21	00.42.21	17	02.10.11	22	03.18.36	19	09.50.06	32,44
21	Christian Guttesen	TSF	00.12.22	21	03.39.51	25	00.43.21	21	02.10.11	21	03.14.24	16	10.00.09	31,89
22	Aiden Bradley	YMON	00.12.08	18	03.29.09	23	00.42.59	20	02.10.05	19	03.26.12	22	10.00.33	31,87
23	Keith Thompson	YMON	00.12.56	24	03.27.05	22	00.43.44	22	02.16.36	25	03.28.47	23	10.09.08	31,42
24	Esmar Joensen	TSF	00.13.04	26	03.44.25	26	00.44.52	24	02.18.05	27	03.20.01	21	10.20.27	30,85
25	John Barry Williams	YMON	00.12.44	23	03.29.14	24	00.45.22	26	02.18.05	26	03.42.17	25	10.27.42	30,49
26	Hans Krosstein	TSF	00.13.17	28	04.04.22	28	00.48.11	28	02.33.24	28	03.47.14	26	11.26.28	27,88
27	Evald Rasmussen	TSF	00.13.48	30	04.03.32	27	00.49.05	30	02.33.24	29	03.47.14	28	11.27.03	27,86
28	Bergur Johansen	TSF	00.15.26	31	04.20.18	31	00.55.20	33	02.41.39	31	04.17.08	29	12.29.51	25,53
Ikki gjøgnumført														
Páll Didriksen		ACR	00.12.00	15	00.00.00	0	00.42.42	18	01.57.00	9	00.00.00	0		
Eli Christiansen		TSF	00.12.11	19	03.04.27	14	00.42.47	19	02.02.45	15	00.00.00	0		
Danjal Michaelsen		TSF	00.13.39	29	04.06.09	29	00.48.30	29	02.34.06	30	00.00.00	0		
Geyr Gilssteinsson		TSF	00.00.00	0	00.00.00	0	00.53.54	32	00.00.00	0	04.26.12	30		
Robert Vilhelmsen		TSF	00.00.00	0	04.09.57	30	00.52.17	31	00.00.00	0	03.47.14	27		